BYGMA
BALSLEV

BYGMA BALSLEV SØKIR...

**Starvsfólk til nýggju Handverkarabúðina**

Sum heitið sigur, er hetta ein nýggjur handil, ið vendir sær beinleiðis til handverkaran.

Tú skalt vera ágrýtin og hugagóð/ur og hava góð samstarvsevni, bæði viðv. arbeiðsfeløgum og kundum.
Best er um tú hevur hóskandi útbúgving, ella drúgvar royndir.

Lønin verður ásett eftir avtalu.

Bygma Balslev kann bjóða tær eitt gott, trygt starv, við góðum arbeiðsfeløgum, og góðum umstøðum annars.

Ljóðar hetta áhugavert, so er at senda umsókn sum skjótast, og viðhefta avrit av møguligum prógvum og viðmælum.

**Umsóknarfreistin er 30. juni 2009**

Nærri upplýsingar fáast við at tosa við
Eyðun Hansen (eh@balslev.fo)




Bygma Balslev - Vegurin Langi - 188 Hoyvík - tlf. 345000

# Aldubáran á ferð

**Aldubáran venur í hesum døgum í nýggju operuni í Keypmannahavn, áðrenn leiðin gongur til Sveis, har tvær konsertir eru á skránni**

TÓNLEIKUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Hesar dagarnar venur Aldubáran í stásiligum hølum í Keypmannahavn. Hornleikarin í Aldubáruni, Páll Sólstein, sum dagliga starvast í Kongaliga Kappellinum, hevur fingið innivist til venjingar í nýggju operuni í Keypmannahavn, nú Aldubáran ger klárt til nýggja ferð.

Aldubáran er júst heim komin av íslandsferð, har hon luttók í framførslu av operuni »Í Óðamansgarði« á Tjóðleikhúsi Íslands. Framførslan í Íslandi varð stórliga fagnað av íslendingum, og er Sunleif Rasmussen nomineraður til eina Grímu, ið mett verður sum størsti heiðurin til líknandi verk í Íslandi.

Næst gongur leiðin til Sveis. Tvær konsertir verða hildnar á ferðini, ein í Winterthur 4. juni og ein í Bern 5. juni. Á konsertferðini verða fýra føroysk verk spæld, og eitt nýtt verk eftir amerikanska tónaskaldið Hseuh Yung-Shen.

Aldubáran hevur seinastu árini havt samstarv við Shen, og er hetta annað verkið hann skrivar til Aldubáruna. Hini tónaskøldini á konsertini eru øll føroysk. Teir eru Sunleif Rasmussen, Kristian Blak, Andras Olsen og Tróndur Bogason.

Fanfare Lontana eftir Sunleif Rasmussen er verk, sum er bygt á hansara verk til Sønderjyllands Symfoniorkester, ið hann skrivaði í fjør. Lontana, ið merkir fjart, er uppbygt á tann hátt at eitt orkestur situr á pallinum og spælir, meðan eitt minni orkestur er fjart frá og framførir. Kristian Blak hevur skrivað verk, ið á føroyskum kallast Norðanvindur.

Verkið hjá Andras Olsen kallast, Eina nýggja ferð. Og er heitið, ein blanding av, at tað skal ímynda eina útferð, og at tað er ein nýggj ferð inn í eina verð hjá tónasmiðinum. Tróndur Bogason hevur gjørt eina nýggja útgávu av verkinum Aliens, ið er fyri klaver, trombone og "Back stage orchestra".

Tónleikarnir á ferðini eru: Andrea Heindriksdóttir, floyta. Anna klett, klarinett, Christina Andersen, fagot, Malin Klingborg, obo, Páll Sólstein, horn, Ólavur Olsen og Johan Hentze, trompet, Andras Olsen, trombone, Jóhannes Andreasen, klaver, og Bernharður Wilkinson stjórnar.

Konsertin kann eisini upplivast í samband við Summartónar í ár í Havn í døgunum 26. juni til 3. juli.

RÁS2 SENDIR BEINLEIÐIS
FRÁ U21-DYSTINUM FØROYAR-RUMENIA

FÓTBÓLTSRADIO
LIVE Á RÁS2






RÁS
...títt fótbóltsradio

LEYGARDAGIN
18.30 - 21.00